tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Vantandi handalag

## *Oddagrein*

Í morgin fer uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum at handa landsstýrinum álitið í málinum um framtíðarstøðu Føroya. Langt um leingi, tí tað vóru ígjár fjúrtan dagar síðani, at nevndarformaðurin boðaði frá, at tá var nevndin um at vera liðug við álit sítt.

Men síðani hava ymiskar hendingar darvað arbeiðnum hjá uttanlandsnevndini, so hon heldur ikki varð liðug við arbeiði sítt fríggjadagin í síðstu viku. Og ígjár fekk formaðurin forfall, so varaformaðurin í nevndini avgjørdi at bíða við at skriva undir álitini til í dag. Tað er alla æru vert, at hann vildi hava Tjóðveldisflokkin við til hesa søguligu hending.

Nú fekk formaðurin forfall, og tað kunnu øll fáa, so hann skal ikki fáa nakra viðmerking um tað, men tey, sum hava fylgt við í hesum máli, eru sannførd um, at formaðurin kundi havt borið skjótari at. Tað er langt síðani greitt, at semjan fór bara at fáast millum samgonguflokkarnar, meðan Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin fóru helst at skriva eitt felags álit. Hinvegin hevur verið eitt sindur ógreitt, hvussu tað fór at verða við Miðflokkinum, men eftir øllum at døma verður hann ikki við í samgonguálitinum.

Nú kann onkur undrast, hví tað á hesum stað verður funnist at tí, at arbeiðið hevur gingið so seint. Áður er víst á, at málið hevur ikki so stóran skund, og at framtíðarstøða má umhugsast væl og virðiligt. Hinvegin hevur føroyski almenningurin bíðað eftir, hvat stóð í uppritinum, tí tað snýr seg um framtíðina hjá okkum øllum. Og uppritið var loyniligt - lagt fram í trúnaði - til uttanlandsnevndin var liðug við arbeiði sítt.

Nú er hon liðug, og í gjár kundu so fjølmiðlarnir, sum hildu seg til undirskriftina í Tinganesi, tá uppritið var flýggjað út, almannakunngera tað. Men nógv nýtt var ikki í álitinum, so í dag seta mong spurnartekin við, hví tað skuldi haldast so loyniligt. Neyvan hevði tað ávirkað arbeiðið í uttanlandsnevndini nevnivert.

Nú hevur hetta drigið út, og samráðingarnar nærkast, men ein orsøk er so vantandi handalag í arbeiðsgongdini seinastu tíðina. Hetta er so ein spurningur, sum Tjóðveldisflokkurin eigur at taka upp innanhýsis. Tann størsti flokkurin á tingi kann neyvan í longdini góðtaka, at formaðurin í tingbólkinum er so ógreiður og skiftir støðu í týðandi málum, eins og at formaðurin í eini av mest týðandi nevndunum ikki megar at leiða nevndararbeiði á ein nøgtandi hátt. Somuleiðis kann spurnartekin setast við, um tann rætta tignin var yvir tingarbeiðinum síðsta leygardag, tá 10-tals mál vórðu løgd fram.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Áheitan á øll fakfeløg í Føroyum

*– um at heita á Føroya Løgting um at avtaka lógina um serligt brennioljuavgjald*



Umframt heimsins hægsta MVG skulu øll húskir í Føroyum gjalda eina upphædd, eitt serligt brennioljuavgjald, ið er uppaftur hægri enn MVG-ið, fyri at halda hitan í egnum húsum o.l.

Við núgaldandi oljuprísum skal hvørt húski gjalda 540 kr í MVG, umframt 730 kr í brennioljuavgjaldi fyri hvørjar 1000 litrar av olju.

Tað verður upplýst, at meðalnýtslan er 4000 litrar/ár.

Útreiðslan verður tí knappar 3000 krónur eftir skatt. T.v.s at bert brennioljuavgjaldið gevur meðalhúskinum eina meirútreiðslu uppá knappar 6000 kr árliga.

Á hendan hátt, skal vanligi føroyingurin bløða 70 milliónir krónur niður í Landskassan.

Ein Landskassa, sum sambart seinastu upplýsingum frá Landsbankastjóranum hevur eitt risaavlop uppá uml 750 milliónir krónur í 1999.

Tað er tí rætt, rímiligt og skilagott at Føroya Løgting avtekur lógina um serligt brennioljuavgjald, ið er órættvíst, óneyðugt og sera tyngjandi hjá føroysku familjuni.

Føroyska familjan fær við avtøku av hesum órættvísisgjaldi ein hart tiltrongdan skattalætta uppá uml 70 milliónir krónur.

Eg fari við hesum at heita á fakfeløgini í Føroyum um at stuðla teimum á Føroya Løgtingi, ið vilja lætta um hjá føroyinginum við heilt at avtaka hetta óneyðuga og órættvísa avgjald.

**Vinarliga**
**Marjus Dam,**
**Løgtingslimur**

*NB: Løgtingsmál nr. 54/1999: Uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um serligt avgjald á brennolju er lagt fram og til viðgerð í løtuni.*

# Almenna umsitingin

Seinastu dagarnar hevur almikið orðaskifti verið um ta vaksandi almennu umsitingina. Semja tikist vera um, at undirritaði hevur ábyrgdina av, at henda umsiting tvey tey seinastu árini hevur "eksploderað" út um alt mark.



**Nakrir politiskir veruleikar**
Løgtingið samtykti endaliga í 1994, at Føroyar skuldu hava nýggja stýrisskipan við sokallaðari landsstýrismannaábyrgd. Stýrisskipanin kom í gildi á ólavsøku í 1995, og ráðharraskipanin á ólavsøku í 1996.

Vit í Sambandsflokkinum vóru tey, sum ávaraðu, og sum vístu á vansarnar við hesi skipan, og ikki minst á tann eyka kostna, sum náttúrliga fylgir við eini so umfatandi broyting.

Hetta bleiv sum ikki einaferð kveistrað til síðis av teimum loysingarsinnaðu flokkunum. Hetta skuldi vera undanførðsla og mótstøða ímóti framburði í Føroyum.

**Endurtøka av sjeytiárunum**
Hetta minnir mest um- og er ein endurtøka av sjeytiárunum, tá ið yvirtøkurnar einki skuldu kosta. Tjóðveldismenn, javnaðarmenn og fólkafloksmenn reikaðu landið runt og boðaðu frá árligum yvirskoti frá yvirtikna postverkinum uppá fleiri tíggjutals milliónir um árið. Nú skal postverkið hava 56 milliónir krónur úr landskassanum, fyri at halda fram.

**Lagnunar speisemi**
Eins og aftaná sjeytiárini, var tað aftur Sambandsflokkurin, sum fekk til uppgávu at seta nýggju skipanina í verk, samstundis sum landið skuldi reisast aftur úr tí djúpastu kreppu, sum teir loysingarsinnaðu høvdu komið okkara samfelagi útí nakrantíð.

Okkum so líkt, varð farið til verka. Skipanin var tillagað einum lítlum samfelag, og gjørd so bílig sum møguligt, tá hædd varð tikin fyri politiska kravinum um ráðharraskipan, nevniliga 5 aðalstýri og einari løgmansfyrisiting.

**Hvar vóru alternativini?**
Tey sum kravdu, og sum fingu teirra vilja um nýggja stýrisskipan og ta ministeriellu skipanina sum tey stóru londini hava, kappast nú , væl hjálpt av loyalum embætismonnum og pressuni, um at finnast at mær og okkum, sum gjøgnumførdu uppgávuna.

Hvørki tá vit loystu uppgávuna, ella síðani, havi eg sæð so mikið sum eitt einasta ítøkiliga alternativið frá nøkrum av teimum. Og sjálvt um teir ikki høvdu hugflog til at koma við alternativum tá, hví hava teir so ikki gjørt broytingar tey seinastu tvey árini, um hugflogið var so stórt?

**Hvar stavar vøksturin frá ?**
Tá omanfyri nevnda er sagt, skal eg av sonnum siga, at eg eri skelkaður av tí vøkstri, sum okkara umsiting hevur verið fyri seinastu tvey árini. Nýggja samgongan setti tveir landsstýrismenn afturat. Hetta førdi aftur við sær, at vit fingu eitt aðalstýri afturat, umframt eina sokallaða sjálvstýrisumsiting, sum bara til sjálvstýrismál einsamøll kostar 12 milliónir krónur í 3 ár. Harumframt hevur so at siga øll landsumsitingin virkað sum ein loysingarfyrisiting til fyrireiking av tí hálovaða komandi fullveldinum. Sjálvandi kostar sovorið nógvan pening.

Hetta er ivaleyst fyrstu ferð í okkara parti av heiminum, at samlaða fyrisitingin í einum landi hevur fingið til uppgávu at reisa land og ríki runt og føra politiska propaganda fyri eini sitandi stjórn. við útvaldum herskara fer hetta fram. Flestu munnu eisini minnast búskaparfrøðingin, sum ikki slapp við, tí hann ikki passaði inn í myndina.

**Summa sumarum**
Ongin skal vera í iva um, at eg taki ábyrgdina av, at hava gjøgnumført tær bygnaðarbroytingar, sum Føroya Løgting álegði mær at gera. Eisini haldi eg fast við, at hetta varð gjørt skjótt, bíliga og væl.

Men at lasta meg ella Sambandsflokkin fyri, at núverandi samgonga hevur blást almennu umsitingina upp, m. a. við tveimum eyka landsstýrismonnum, við — í krónum — nógv meira enn tveimum eyka aðalstýrum, tað góðtaki eg ikki undir nøkrum umstøðum.

Tað má sitandi løgmaður, og sitandi landsstýrismenn, við teirra baklandi taka ábyrgdina av.

At teir hava blást almennu umsitingina upp í krónum og oyrum, tað er forkastiligt. At teir harumframt hava broytt almennu umsitingina til politisk amboð í tí nógv umrødda amboðskassanum, tað er uppaftur nógv verri.

**Edmund Joensen**

# Nevin var á lofti

Sveinur Tróndarson

Tað er ikki altíð, at tað er ætlanin men tað hendir seg kortini við hvørt, at so stór øði kemur í fólk, at nevarnir eru á lofti.

Um vikuskiftið fekk løgreglan í Havn tvær fráboðanir um harðskap í Club 20. Ein maður hevði ripað einum øðrum nevan beint frammaná so at nøsin brotnaði.

Í einum øðrum føri vóru tveir menn farnir at skeldast so mikið, at tann eini hevði skallað hin í vangan so at hann meiddi sær oyra.

Løgreglan sigur, at teir báðir, sum slógu og skallaðu vóru millum 25 og 35 ár.

– Men tað kann tykjast løgið, at fólk ikki duga sær hógv tá tey fara í býin og tað er sera óheppið, tá slíkt kemur fyri. Og sum oftast er tað kleyvarskapur, sigur vakthavandi.

Sum vant hevði gistingarhúsið við J. Broncksgøtu eisini opið um vikuskiftið. Tríggir mans høvdu fingið so mikið innanborða, at teir vunnu upp hús ella teir vistu, hvar teir búðu.

Tí tók løgreglan menninar við á støðina har teir fingu eina song at sova í. Tá teir vóru klárnaðir so mikið dagin eftir, vórðu teir settir út aftur á gøtuna og tá mundi gangast betur at stýra heim til hús



